# Í fótasporu

**Annar partur:**

Her í býnum Efesos vita vit, at menn sum Paulus og Lukas hava gingið. Sagt verður eisini, at Jóhannus apostul livdi sína seinastu tíð her, og Homeros hevur, sum sagt verður frá, eisini havt sína dagligu gongd í býnum og gjørt síni heilt natúrligu ørindi, sum í fornøldini á so mangan hátt neyvan hava verið so nógv øðrvísi, enn tey eru hjá teimum, sum nú eru uppi á døgum



*Á gamla tingi Efesosmanna eru nógvar týðandi avgerðir tiknar. Ì dag verður tingið mest nýtt av ævintýrhugaðum ferðafólkum og fegnum skúlaungdómi, sum sær fragd í at taka floksmynd á hesum søguliga stað*

FERÐAFRÁSØGN

*Orð og myndir*
*Edvard Joensen*

**Efesos**

Tá vit eru leys av hesum ágangandi handilsmonnunum, verður farið til gongu oman gjøgnum býin, sum vit síggja. Her eru allar síðugøtur burtur, so vit fylgja høvuðsgøtuni millum toftirnar av bygningum og standmyndum, sum í forðum hava myndað býarins stórleika.

Ganga fram við gomlum vatnleiðingum, sum koma so dittimundar fram undan vegbreytini. Liggja har soleiðis heldur lurvutar. Fyltar av mold og eyri, so har rennur ikki vatn ígjøgnum.

Fara framvið, og koma til eina røð av áhoyraraplássum, og onkur vil halda, at her hevur uttan iva eitt sjónleikarhús ligið.

Jú, tað kann vera, sum ein tekur tað. Men sjónleikarhús var tað tó ikki, uttan ein tingsalur.

Her sótu býarinnar mætu menn og tóku stórar avgerðir, sum fingu týðandi avleiðingar fyri borgararnar og kanska onkran vitjandi við.

Vit vita frá Apostlasøguni, at tá Paulus við sínum virksemi hevði fingið loypt ótta á og øði í silvursmiðirnar, var ein býarskrivari, sum mátti uppí sum semingsmaður. Og ivaleyst hevur hann havt síni ørindi her í tingsalinum ella í ráðhúsinum ikki so langt hiðani.

**Á nátthúsinum**

Vatnleiðingin er farin undir jørð, og her undir okkum eru rørini skift út við eina opna rennu, sum fer her einar tríggjar metrar niðri, og tekur tað við sær, sum undan mannamúgvuni kemur.

Vit eru komin inn á eitt fleiri túsund ára gamalt alment nátthús. Her eru 50 setur lið um lið, sum høgd hava verið í blankt marmor. Vit síggja enn nøkur av teimum originalu. Men tey flestu eru tó eftirgjørd í nýggjari tíð. Av betongi.

Her síggjast hesi setrini lið um lið oman eftir. Ganga í vinkul, tí ikki var bygningurin kortini so stórur, at hann hevði pláss fyri øllum fram við sama veggi.

Her sótu so býarins framkomnu menn lið um lið og lótu sín avførning fara. Niður í hesa djúpu rennuna, har vatnið fór við tí, sum slept varð.

Men rímiligt skuldi eisini gerast reint eftir hesa vitjanina. Og til tess høvdu teir vísu Efesosbúgvarnir lagt eina rennu framman fyri fótinum á tí vitjandi, har hann tók hondina niður í, og so upp undir endan við henni. Eitt skarð varð niður í steinin fyri framman, so lætt var at sleppa til uttan at noyðast at reisa seg.

Men tað man tó neyvan hava verið so heilt tespiligt kortini hjá tí seinasta, sum sat undan brekkuni, tá rennandi vatnið frá teimum fyrstu 49, sum høvdu reinsað hondina aftur, kom oman til hansara.

Hóast hesin summardagurin er heitur, hevur tó onkuntíð verið kalt um veturin, og ikki allir endar hava hildið tað verið líka stuttligt at skula seta seg á ein kaldan marmorsess. So tá onkur av teimum í ovara enda á hierakinum kendi á sær, at tað nærkaðist eini nátthúsvitjan, sendi hann ein træl undan sær soleiðis einar tíggju-fimtan minuttir, so hesin kundi hita setrið eitt sindur, áðrenn tann sperdi harrin kom.

So sótu teir har, og hoyrdu merkilig ljóð frá síðumanninum, sum teir kortini ikki sóu, tí ein lítil skilaveggur var reistur ímillum. Einki er tó at ivast í, at av og á hevur onkur viðmerking til dagsins mál fallið kortini.

Hetta var stórt rúm, og har man hava luktað hvørki so. So miðskeiðis í rúminum var



*Mangar eru søgurnar, sum hesir steinbenkur høvdu kunnað sagt, dugdu teir at tala eins og mennini, sum í forðum høvdu sína gongd her*



*Ein sjáldsaman anga - ikki av kamfertræ - men av livandi søgu kenna tey, sum nú tvey almennu bukkuna, har teir kanska hava sitið*